# TILTØK

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Minnismáltíð Harrans, kl. 12.00 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti. Páll Poulsen talar um Heb. 13.3. »At minnast fangar og tey, ið ilt líða«.

**Kirkju og missiónshúsið á Argjum**
Jólatræ verður fyri børnum leygardagin 8. desember. Børn undir skúlaaldur kl. 15.00. Børn í skúlaaldri kl. 19.00. Jólafestin fyri tey vaksnu verður sunnukvøldið 9. desember kl. 19.00.

**»Tíð til Gud«**
verður úti í Pálsstovu sunnukvøldið kl. 21.00. Seinasta »Tíð til Gud« møti í hesum árinum. Á skránni verður millum annað Rís á la mande og drama. Verið hjartaliga vælkomin.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10.00 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Triðja sjónin, blýloddi. Kl. 11.00 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Rhema á Hálsi**
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 ATAP Kids.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti og Sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

**Sjómanskvinnuringurin í Havn**
kemur saman á Sjómansheiminum mánakvøldið 10. desember kl. 20.00. Sjómanskvinnuringurin á Argjum verður við.

**Katólska kirkjan**
Hósdag kl. 20.00 verður Taizé-kvøld í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 Hámessa í Mariukirkjuni.
Mánakvøld kl. 20.00 verður adventsgudstænasta (við bótarinnar sakramenti) í Mariukirkjuni.
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11.00 Møti, Súni Rasmussen talar, kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18.00 Møti, Palli Petersen talar.
Mánadagin kl. 17.00 og 19.00 Skótamøti.

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 15.00 Jólafest fyri børnum undir skúlaaldur, kl. 18.00 Jólafest fyri børnum í skúlaaldri.
Mánakvøldið kl. 20.00 venur Manskórið.

**Meinigheitin í Hoyvík**
Sunnudagin kl. 14.00 í Hoyvíkar skúla sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti og kl. 18.00 Møti við Jógvan Lamhauge, Ova Lááberg og Mourits Viderø syngur. Øll eru vælkomin.

**Ebenezer**
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti. kl. 21.00 Útimøti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í kvøld kl. 21.00 Ungdómsmøti, í morgin kl. 17.00 Landsbøn, kl. 19.30 Jólaveitsla fyri vaksin.
Sunnudagin kl. 16.00 Jólaveitsla fyri øll.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20.00 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Hvalvíkar missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30-19.00 Jólaveitsla fyri vaksin. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygardagin kl. 17.00 Barnajólafest, kl. 21.00 Opið hús. Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Paula Høj, kl. 17.00 Barnamøti.

**Siloa, Fuglafirði**
Sangmøti við sangkórinum í Siloa verður sunnukvøldið kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð**
Tim. 5 verður í kvøld kl. 18.00.
Jólahugni fyri Liljurnar, Tim 5 og annars øll børn verður leygardagin kl. 14.30.
Sunnudagin kl. 10.30 verður møti við Thormund Hansen.

**Soli Deo Gloria**
Mikumorgunin kl. 6 Bøn.
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Leygarkvøldið kl. 20.00 Alpha skeið.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Fríðtór Debes.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bíbliutími/bøn.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið 8. des. kl. 20.00. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður fríggjakvøldið kl. 21.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við John og Tove Hammer. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Café One Way, Tvøroyri**
Leygarkvøldið verður latið upp kl. 21.00. Sámal Jákup og Elisabeth Joensen luttaka.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kakao og bollar, kl. 18.00 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangeliskur fundur.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarfundur.
Týsdagin kl. 20.00 Ungdómsfundur.
Ónsdagin kl. 20.00 Uppbyggingarfundur.

**Dagtilhaldið Fløvin**
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
**Kennir tú føroying í Keypmannahavn**, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við
*Reyða Kross Føroya,*
*Bryggjubakki 10,*
*100 Tórshavn*
*tlf. 311391/261516.*

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag kl. 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 3. des.:*
kl. 10.00-10.15: Fimleikur, Sonja Danielsen.
kl. 14.00-18.00: Kortspæl, telving og onnur spøl. **Tilmelding til jólaborð mikudagin og fríggjadagin tlf. 316491**
*Týsdagin 4. des.:*
kl. 10.00–12.00: Vit baka
kl. 10.00–11.30: Sangur - Eyðun Sørensen/Beinta H. Jacobsen. **Øll eru hjartaliga vælkomin.**
kl. 15.00: **Demens – lívsvirðið**
Vilgerð Astridardóttir
*Mikudagin 5. des.:*
kl. 10.00–12.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: **Jólaborð og pakkaspæl.** Tilmelding mánadag tlf. 316491
kl. 15.00: Túrur
*Hósdagin 6. des.:*
kl. 10.30–11.00: Fimleikur - Sonja Danielsen
kl. 14.00–17.00: Telduprát - Brandur Petersen
*Fríggjadagin 7. des.:*
kl. 10.00–13.00: Matgerð – Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: **Jólaborð og pakkaspæl.** Tilmelding mánadag tlf. 316491
kl. 15.00 **Konsert**
Eivør Pállsdóttir og Búi Dam

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21 og 22.30-23.30.
Týskvøld: Er bara fundur ólíka viku nr.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/˜aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

**Al-anon**
hevur fundir hvørt mánakvøld kl. 20.30 í gomlu læknahúsunum á Tvøroyri.

**Blái Krossur**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International, Føroya deild**
*Tinghúsvegur 18, 4. hædd*
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
*tlf. 21 04 95.*
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**MBF**
*Íslandsvegur 10C*
*100 Tórshavn*
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

**Giktafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10 C*
*100 Tórshavn*
*Tlf. 310237 · Fax 310813*
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Sinnisbati**
*Íslandsvegur 10 C,*
*100 Tórshavn*
*tlf. 322544 · Fax 310813*
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

## 70 ÁR

Leygardagin 8. desember verður Thor Jacobsen, Sandavágur, 70 ár. Dagurin verður hildin hjá Jettu og Petur.

## PRÓGV

Tann 30. nov. var Bárður Olsen, útlærdur sum grótsmiðjur, lærumeistari hansara var Tór Sigmundsson, Steinsmiðurinn EHF. Island.

**Javni**
*Hoydalsvegur 40*
*3. hædd (ovast).*
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 10-14.
Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**Cøliakifelag Føroya**
*Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
*Postsmoga 1063*
*110 Tórshavn.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á
e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Heilafelagið, MBF-húsið**
*Landavegur 10*
*tlf./fax 321520*
Føst telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: Týsdag kl. 10.00–11.30 og hósdag kl. 16.00–17.30.
Til ber at tekna seg sum lim og eisini kunnu tit støkka inn á gólvið.
Vit hava ymiskt til sølu so sum bøkur, faldarar, videofilmar, lyklaringar, føðingardagskort og peak flow meter.

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Føroyska felagið í Ballerup**
Leygardagin 15. desember kl. 15.00 verður jólafest fyri børnum og vaksnum á Ryttergården í Pederstrup. Tilmelding hjá Hjørdis á tlf. 44482561 í seinasta lagi 10. desember.

**Føroyingafelagið í Århus**
*Vestergade 48D*
*8000 Århus C*
*Tel. 86 18 06 04*
Teldupostur:
aaarstova@hotmail.com
Café'in er opin mánadag til hósdag kl. 16-18 og leygarkvøldscafé kl. 22-03.
Reglulig tiltøk: Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30.
Bókasavn: Føroyskar bøkur kunnu lánast í Áarstovu mánadag-hósdag kl. 16.00-18.00.
MFS-stovan hevur opið hvønn mikudag kl. 16.00-18.00.
Kassameistari er at hitta hvønn mikudag kl. 16.00-18.00.
Flogbóltur er í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16.00-18.00. Badminton í Frydenlundskúlanum sunnudag kl. 16.00-18.00. Innandura fótbóltur í Hasselagerhøllini fríggjadag kl. 21.00-23.00.

**Føroyingafelagið í Esbjerg**
*Danmarksgade 25,*
*6700 Esbjerg, tlf. 75132747*
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

**Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark**
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur:
fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum. Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt.

**Føroyingar í Noregi**
E-mail:foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.



## FILMSTEIGURIN

# Don't say a Word

Dr. Nathan Conrad (Michael Douglas) er sálarfrøðingur, og tað gongur sera væl hjá honum. Hann hevur alt, sum hann kann ynskja sær, egna klinikk í modernaða Upper West Side í New York, eina vakra konu (Famke Janssen) og eina søta og sjarmerandi dóttur (Skye McCole Bartusiak).

Hann er á veg heim fyri saman við familjuni at hátíðarhalda alla halganna dag, sum í USA meira er sum føstulávint á okkara leiðum. Tá ringir ein starvsfelagi til hansara, tað er Louis Sachs (Loiver Platt). Hann stendur júst við einum mystiskum psykiskum tilfelli: tann unga gentan Elizabeth (Brittani Murphy), sum eftir nógvar ógvusligar harðskapshandlingar ein eftir nógvar skeivar diagnosur, eftir øllum at døma er flýggjað inn í ein permanenta katatoniska støðu. Nathan Conrad er síðsta vón hennara; kanska kann hann við sínari ekspertisu treingja inn til gentuna. Nathan letur seg – eitt sindur irriteraður – lokka til at kanna gentuna, og tað eydnast honum faktiskt at gjøgnumskoða, at tann katatoniski tilstandurin er ein serdeilis vælspældur sjónleikur frá hennara síðu. Og tað einasta, hon vil siga, er: »Tú ert úti eftir tí sama sum teir! … Eg sigi tað ongantíð … ikki nøkrum tykkara!«





Ikki órar Nathan, at hetta bara er upptaktin til, at hann skjótt verður vavdur út úr síni tryggu tilveru. Næsta morgun er dóttirin (næstan) sporleyst horvin, og stutt eftir verður ringt til Nathan. Tað er ein brotsmaður, uttan skruplir, sum eitur Koster (Sean Bean). Hann sigur Nathani, at inni í teirri sjúka høvdinum hjá Elizabeth goymir seg eitt sekssiffrað tal. Hetta talið má Nathan fáa »grivið fram« sama dag – í seinasta lagið kl 17 – annars doyr dóttir hansara…!

Harvið er startskotið latið av til ræðandi kapprenningina við tíðina, har Nathan skal royna at treingja gjøgnum traumaið hjá Elizabeth, samstundis við at hann uppdagar, at íbúð hansara er undir støðugum eftirliti – og harvið eisin Aggie, kona hansara, sum ikki sleppur fyri dyr, tí honum hevur brotið beinið…





**Frumsýning**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 07.12. | kl. $21^{00}$ | Fríggjadagin | 07.12. | kl. $23^{00}$ |
| Leygardagin | 08.12. | kl. $20^{45}$ | Leygardagin | 08.12. | kl. $23^{30}$ |
| Sunnudagin | 09.12. | kl. $19^{45}$ | Sunnudagin | 09.12. | kl. $22^{30}$ |

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
Tlf. 3119 56




**Billettprísur: 50.- kr. –**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 07.12. | kl. $15^{00}$ | Fríggjadagin | 07.12. | kl. $16^{15}$ |
| Fríggjadagin | 07.12. | kl. $17^{30}$ | | | |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 07.12. | kl. $18^{30}$ | Fríggjadagin | 07.12. | kl. $23^{30}$ |
| Leygardagin | 08.12. | kl. $23^{00}$ | Sunnudagin | 09.12. | kl. $22^{00}$ |




**Aldursmark: 7 ár. – Børn undir 10 ár sleppa tó bert inn um tey fylgjast við vaksnum**
**Billettprísur: 65.- kr. –**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 07.12. | kl. $19^{15}$ | Leygardagin | 08.12. | kl. $17^{30}$ |
| Leygardagin | 08.12. | kl. $19^{45}$ | Sunnudagin | 09.12. | kl. $16^{30}$ |
| Sunnudagin | 09.12. | kl. $18^{45}$ | | | |

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning**
Mikudagin **19.12.** kl. $19^{00}$ Mikudagin **19.12.** kl. $22^{15}$
**Billettprísur: 70.- kr. – Forsølan er byrjað**